# Kjak



Steinbjørn O. Jacobsen

## Hetta er tað samgongan vil

*Hvør meining er í, at kommunurnar byggja Ellis-og Røktarheim, tá ótryggleiki er, um nógmikið av rakstrarfigging fæst frá landinum til at reka heimini.*

Høvuðsyvirskrivt mín er ein av viðmerkingunum, sum samgongulimir dagliga krógva seg undir, tá spurt verður einstakan løgtinslim um eina og hvørja avgerð, sum ikki er so heppin, og sum viðkomandi løgtinslimir ikki hóva so væl. Vit hava so mong dømi um, at so er, og her skulu bert nevnast nøkur fá mál, sum hava og fara at fáa álvasligarfylgir fyri hin einstaka og fyri kommunur.

Fyri at nevna tað seinasta skotið á stammuni fyrst eru tíðindini frá landstýrinum, at sambýliðsplássini vera nú skerd niður við 33 búplássum

Hetta er ikki til at skilja, tí fleiri kommunur hava í samráð við landsmyndugleikarnar tikið eitt ódnartak fyri at hjálpa um tørvin á røktarheimsplássum við at byggja Ellis-og Røktarheim, og kommunurnar bera jú størsta fíggjarliga íløgupartin, men lítilhjálp er í, tá landsstýrið uttan kunning til kommunurnar skerjir normeringina av plássum við at niðurleggja 33 pláss.

Er ongin rakstrarjáttan til heimini, er óneyðug at at byggja tey. Tí er tað ein spurningur, um ikki kommunurnar í fyrstu atløgu eiga at steðga ætlaðu nýbyggingum av ellis- og røktarheimum, tí sum útmeldingarnar frá landsstýrinum eru, hava vit onga trygd fyri, at nóg mikið av peningi fæst at reka heimini fyri.

Og tað undrar ongan, um ein útmelding kemur frá onkrum samgongulimi, at hetta kunnu vit onki gera við, tí "**hetta er tað, samgongan vil**"

Tað hevur havt lítla ávirkan, at m.a. Javnaðarflokkurin hevur mótmælt, og í øllum førum er so eiðasørt, at tað hevur fingið nakrar avleiðingar hvørki fyri samgongunaella nakran annan, nei, um nakrar fáar dagar er hatta gloymt, og vit fáa næstu óhepnu avgerð, so er fokus vent frá seinasta avgerð. Soleiðis var, tá landsstýrið tók avgerð um, at hækka gjaldið hjá

***Er ongin rakstrarjáttan til heimini, er óneyðug at at byggja tey***

búfólkunum á sambýlum við 2.000 krónum, tá gnístu nakrir tinglimur eina løtu, so var tað gloymt. "**Hetta er jú tað samgongan vil.**"

Um vit so hugsa um, hvussu tey, sum eru noydd at brúka nógvan og dýran heiluvág, eru viðfarin undir hesum landstýri, er hetta ikki til at skilja, og byrðin blívur bert tyngri og tyngri fyri hvønn dag, henda samgongan situr við stýrisvølin. Tað er lítið at siga til, at Javnaðarflokkurin fær vánaliga undirtøku í veljarakanningum, tað eru jú í stóran mun eisini teirra veljarar, sum verða raktir dag um dag. Tað er ov seint at vakna, tá valdagurin kemur.

Men hetta passar jú høgraflokkunum væl, og so leingi ongin vekt er í orðum Javnaðarfloksins, blómar høgrapolitikkur samgongunnar, hann liggur jú ikki til tey veiku og gomlu. Ikki hava hesi fólk slík kor uppiborið.

Bert við t.d. at skerja játtanina til Uttanríkiðsráðið úr uml. 48 mill.kr. niður á 33 mill.kr. ella lagt Ráðið saman við annað Ráð, hevði næstan ongin av teim skerjingum, tey eldru og veiku hava verið fyri, verið neyðugar. Er tað ongin politikari í samgonguna, sum torir at seta eitt líknandi uppskot fram.

Nú mugu samgongulimir í sjálvrannsakan og gera sær sjálvum greitt, hvat alt hetta endar við, ella "**Er hetta tað, samgongan vil**"



Helgi Abrahamsen
*løgtingsmaður*

## Høgni vaskar aftur hendur

Eitt av hesum eyðkendu, afturvendandi, stórvaskunum hjá Høgna Hoydal, stóð at lesa í bløðunum í farnu viku. Peikað varð í allar ættir eftir øðrum politikarum, sum runnu undan ábyrgd, og í ljósinum av hesum, frásegði høvundin sær alla ábyrgd av egnum gerðum. Hetta er einki nýtt.

Í greinini fílist Høgni millum annað á, at landsstýriskvinnan í almannamálum sleppur í fjølmiðlunum at geva blokkniðurskurðinum skyldina fyri sínar avgerðir á eldraøkinum.

Eg má spyrja: Hevur Høgni ikki sjálvur sagt, at blokkniðurskurðurin og fastfrystingin kosta 800 mió. krónum um árið (umleið tað sama sum undirskotið á fíggjarlógini)? Hvussu kann hann so pástanda, at neyðugu sparitiltøkini, fyri at venda undirskotinum, einki hava við blokkniðurskurðin at gera?

Hann vísir eisini á, at andstøðan hevur havt alternativar loysnir, fyri at venda skeivu gongdini. Jú, tað kann gott vera, men Tjóðveldi hevur sanniliga eisini havt uppskot um at seta enn meira ferð á tað, sum hann sjálvur kallar "niðurbræðingina". Bara í fjør skuldu 117 mió. krónur afturat takast av inntøkum landskassans, stóð tað til Høgna og Tjóðveldi. Fyri 117 mió. kunnu vit fáa sera nógv røktarheimspláss, men hesir pengarnir skuldu bara tveitast burtur, meðan bíðilistarnir hjá teimum gomlu gjørdust longri og longri.

### Andstøðan var við í fíggjarkarmunum

Mitt í øllum sápuskúminum frá hesum stórvaskinum, koma nøkur smá ósannindini, sum lesarin helst ikki skal leggja merki til. Millum, annað skrivar hann, at fíggjarkarmarnir vórðu samtyktir, "hóast tað var væl og virðiliga víst á frammanundan, at tiltøk landsstýrisins fóru bert at raka veikastu samfelagsbólkarnar og eldrarøktina."

Legg til merkis at Høgni vísir til "tiltøk landsstýrisins". Hann roynir við hesum at villleiða lesaran, soleiðis at hann ikki leggur til merkis, at tað var ein samd fíggjarnevnd (íroknað umboðini hjá Tjóðveldi), sum mælti til at samtykkja fíggjarkarmarnar. Harafturat atkvøddu øll andstøðufólkini, sum vóru í tingsalinum, fyri uppskotinum. - Men tað ljóðar sjálvandi betur at kalla tað fyri "tiltøk landsstýrisins".

Og hvat var tað, sum so væl og virðiliga var víst á frammanundan? Hvat segði til dømis Hvítabók (amboðskassin hjá Høgna) um almenna sektorin? Var tað ikki okkurt við, at búskaparvøksturin tey næstu 15 - 20 árini, mátti ikki brúkast til at vaksa- men heldur minka um almenna sektorin, fyri at fáa ein sjálvberandi búskap?

Síðani Hvítabók kom út, eru almennu rakstrarútreiðslurnar vaksnar eina slaka milliard, og nú royna 28 tingfólk, við einum rakstrarkarmi, at fáa vent hesi gongdini. Er hetta ikki júst uppskriftin úr amboðskassanum hjá Høgna, sum nú rakar veikastu samfelagsbólkarnar og eldrarøktina? Men tíbetur kom Høgni ikki á mál við sínum fullveldisdreymum, og tí verða avleiðingarnar hóast alt ikki so ógvusligar, sum tær annars høvdu verið, um øll fullveldisætlanin varð gjøgnumførd.

Eitt er at vaska hendur – nakað heilt annað er at hvørva, allur sum man er, í sápuskúmi.

Grímur Jacobsen

## Ólavsøku-kappróður 901 metur

Á Kaldbaksfirði ber til at rógva 1000, 1500 og 2000 metrar.

Eg meti, at tað er eingin trupulleiki at flyta áskoðarar. Bussar eru nógvir.